## Minni jøklar fleiri jarðskjálvtar

Ein nýggj kanning hjá jarðfrøðistovninum á lærda háskúlanum í svenska býnum Uppsala vísir, at í Íslandi er samband millum ísjøklarnar og skjálvtavirksemið í undirgrundini. Niðurstøðan hjá granskarunum er, at skjálvtarnir í undirgrundini gerast fleiri, so hvørt sum jøklarnir minka. Í arbeiðinum hava granskararnir kannað meiri enn 13.000 harðari og veikari skjálvtar, sum hava verið í Íslandi tey seinastu átta árini, og úrslitið vísir, at samband er ímillum virksemið í undirgrundini og støddina á jøklunum. Granskararnir í Uppsala siga, at jøklarnir fara at minka orsakað mav tí veksandi hitanum á jørðini, og at íslendingar tí kunnu vænta fleiri jarðskjálvtar í komandi árum.



## Leita eftir stórari gassleið

Í november í fjør rindaði norska oljufelagið StatoilHydro næstan 20 milliardir krónur fyri at sleppa at leita eftir og útvinna gass í Marcelles-økinum í landnyrðingspartinum av USA. Einar 2.500 metrar undir jørð er ein gassleið, sum verður hildin at veta eitt av teimum størstu í heiminum. Amerikonsku myndugleikarnir hava býtt økið sundur í 16.000 loyvir. Av teimum hevur StatoilHydro fingið 33,5 prosent, sum svarar til eitt øki upp á 7.300 ferkilometrar. Felagið hevur longu gjørt fýra royndarboringar, og úrslitini hava verið góðm skrivar Aftenposten.

# Funnu fleiri pornografiskar myndir í telduni



*Ríkispolitiið hevur serdeild, sum kannar teldur nærri, tá ið illgruni er um eitt nú barnaporno. Sjálvt um brúkarin hevur strikað myndirnar, ber til við serligum amboðum at finna tær aftur*

*Modellmynd*

**Hóast barnapornografiskar myndir verða strikaðar, ber til við serligari útgerð at finna tær aftur, segði ein teldukønur politistur á rættarfundinum mánadagin. Rættarmálið snýr seg um siðamisbrot**

RÆTTARMÁL

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Rættarmálið móti einum 43 ára gomlum manni, sum er ákærdur fyri at hava gjørt seg inn á eina smágentu og fyri at hava tikið niður pornografiskar myndir og videofilmar av internetinum helt fram í dag.

Málið varð viðgjørt fyri afturlatnum hurðum, men eina løtu varð hurðin sett á glopp.

Tað var meðan eitt av vitnunum varð avhoyrt, og hetta var ein danskur politistur við stórum kunnleika til barnapornografi.

Hann arbeiddi á deildini, sum kannar teldur fyri politiið, og hasnn kannaði eisini harðdiskin hjá tí ákærda føroyingum, sum nú er ákærdur.

Danski politisturin greiddi frá, at hann fekk kopi av harðdiskinum, sum hann so kannaði.

Summar myndir, sum tiknar eru niður av internetinum, eru lættar at finna aftur, men tað ber eisini til at finna aftur myndir, sum brúkarin hevur strikað. Til tað krevjast tó serlig amboð, segði hann.

### Aldursmunur

Á rættarfundfurin varð hann spurdur um, hvussu ung fólkini á nøkrum myndum vóru. Hetta vórðu myndir, sum funnar vórðu teldu hansara.

Politisturin segði, at hann brúkti bara vit og skil fyri at kunna siga, hvussu ung ella gomul børnini ella tey ungu á myndunum vóru. Hann metti út frá hondunum, long á ørmum, skøvningunum, húðini, og hvussu útviklað tey vóru kropsliga.

Á onkrum myndum metti hann aldurin at vera 14-16 ár, á onkrum eitt sindur eldri.

Fyri ákæruvaldið hevur aldurin á børnunum og teimum ungu nógv at siga, tí eftir føroyskari lóg, er tað bara barnaporno, um børnini eru undir 15 ár. Í danski lóg er aldursmarkið 18 ár.

Føroyska lógin verður broytt í næstum.

# Herviligi Henry herjar aftur

**Heili átta nýggjar søgur eru at finna í tveimum nýggjum bókum um Herviliga Henry og hansara skálkabrøgd**

BØKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@saosialurin.fo*







*Tvær heilar bøkur fullar av nýggjum skálkabrøgdum hjá Herviliga Henry eru nú at fáa í bókabúðunum*

Skálkabrøgdini hjá Herviliga Henry tykjast ongan enda at fáa. Nú er hann aftur á ferð í teimum báðum bókunum *Herviligi Henry og undirbuksirnar* og *Herviligi Henry og stinkbumban*.

Í fyrru bókini verður Henry so fyndarglaður, tá hann fær eina seinkaða føðingardagsgávu. Gávan er tunn og bleyt, og Henry skræðir grammur pappírið av, tí hetta kann ikki vera annað enn pengar, hugsar hann. Men gakk! - gávan er frá abbasystrini, sum heldur at Henry er ein genta, sum dámar væl ljósareyðar blondutrussur. Skelkaður stendur Herviligi Henry við blondutrussunum í hondini, tá hann hoyrir fetini av Freka Fríða, sum kemur trampandi upp gjøgnum trappurnar ...

Í hinari bókini fær Herviligi Henry av álvara brúk fyri at hevna seg, og tað er ikki við mýkindum. Onki minni enn ein ordans stinkbumba má framleiðast, so nú er at finna tann vemmiligasta luktin, hann kann ímynda sær. Skal tað vera ringur andi, hundalortur, rotið egg, fótasveitti, deyður fiskur ella? Herviligi Henry hyggur kannandi í sína loyniligu stinkbumbuútgerð og fer so í holt við at blanda ...

Umframt søgurnar um undirbuksurnar og stinkbumbuna eru heili seks aðrar søgur í nýggju bókunum um Henry og hansara skálkabrøgd, sum altíð fáa onkrar stuttligar avleiðingar.

Tað er Bergur Rasmussen, sum týðir bókurnar um Herviliga Henry. Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út.

Vit selja m.a.
- garaguhurðar
- slúsir
- lossibrýr
- skjóttgangandi hurðar



Vit hava drúgvar royndir – spyr okkum um tilboð

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
VESTARA BRYGGJA · BOKS 3135 · 110 TÓRSHAVN
TLF. 319992 · TMV@OLIVANT.FO
Crawford

Eysturkommuna

Vaskifólk

Søkt verður eftir vaskifólki til barnagarðin í Leirvík at byrja 01. august 2009

Talan er um starv á 25 tímar um vikuna.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ove Heinesen, umsitingarleiðara, á tlf. 730012.